# TWR – KVINNUR VIÐ VÓN

## BØNARÁHEITANIR FYRI JUNI 2026

1. Harri, nem hjørtuni á pápum í **Indonesia**, sum hava nógv um at vera, at teir gerast nærverandi, vísa kærleika og taka lut í uppalingini av børnunum. Og veit teimum vísdom at finna javnvág millum arbeiði og familju. (Sálmur 103:13)
2. Opinbera Teg, Faðir, fyri teimum 1.2 milliónum einligu mammum í **Japan**, so tær finna meining og vón, tá tær royna at javnviga millum arbeiði og barnauppaling í einsemi og trýsti. (5.Mósebók 10:17-19)
3. Harri, før kærleiksfullar umsorganarpersónar til børn á **Papua Ný Guinea** , sum hava mist foreldur orsakað av HIV/AIDS. Fevn tey við Tínum kærleika, Tínari umsorgan og varðveitslu. (Esaias 41:10)
4. Styrk familjur í **Paraguai**, Gud, so tær leggja grundstøðið í heimi sínum á bíbilskar meginreglur, heldur enn á galdandi hugsunarhátt, sum broytist við tíðini. (Josva 24:15)
5. Faðir, hjálp kvinnum í **Portugal** at finna virði sítt og kunna hvíla í Tær. Veit teimum vísdóm at nýta tíð sína rætt, og frið, tá ið tær skulu taka torførar avgerðir, og líta á, at tú ert ein trúfastur forsyrgjari. (Sálmur 23:1)
6. Í **Rumenia** sæst ein ørkymlandi øking av, at kvinnur verða dripnar av sínum makum. Harri, verj viðbreknar kvinnur og vegleið myndugleikar at koma við munagóðum loysnum fyri at fáa enda á hesum skelkandi brotsgerðum. (Sálmur 82:3)
7. Gud, ger, at pápar í **Eystur Kappa** í **Suður Afrika** ikki rýma frá familjuni, men í staðin taka sær av henni við umsorgan, og vera børnunum ein fyrimynd. (Efesusbrævið 6:4)
8. Miskunnsami Harri, 40% av teimum eldru í **Suðurkorea** liva í fátækdømi. Gev leiðarunum styrki og megi at skapa munagóða røkt, sum fremur veruligar loysnir og styðjar tey, sum kenna vónloysi og tunglyndi. (3. Mósebók 19:32)
9. Faðir, styrk og ugga tey eldru í **Timor-Leste,** sum kenna seg veik, einsom og gloymd. Hjálp familjum og samfeløgum at vísa teimum virðing og kærleika og taka sær væl av teimum. (Sálmur 54:6)
10. Harri, lat einligar mammur í **Uruguai** finna sín samleika og vísdóm í Tær; verj tær og lat tær vinna til lívsins uppihald. Veit teimum styrki til at uppala børn síni í einum sunnum umhvørvi. (Sálmur 121:7)
11. Gud styrk kærleikan millum hjún í **Vjetnam**, sum hava trupulleikar í hjúnalagnum. Veit teimum grøðing, og lær tey at skilja hvørt annað og fyrigeva hvør øðrum. (Kolossebrævið 3:13-14)
12. Harri, styrk einligar mammur í **Albania**, sum tær taka sær av børnum sínum, hóast tær hava meira enn eitt starv, fyri at tær kunnu hava ráð til húsaleigu, mat og alt tað neyðturviliga. (Sálmur 132:15)
13. Reis upp vísar leiðarar í **Bonaire**, so teir kunnu læra ungdómin at liva í trúgv við dirvi, so tey ikki lata seg ávirka av mótloysisanda, ræðslu og ótryggleika.(2. Timoteusarbræv 1:7)
14. Slít leinkjurnar, Gud, av sosialum miðlum í **Bonaire,** sum foreldur og børn eru fjøtra í, og sum skilja tey at. Lat samskiftið og sambandið teirra millum gerast sterkt aftur. (1.Tessalonikubræv 5:11)
15. Harri, lat menn og kvinnur í **Kambodja** virða trúskapin í hjúnalagnum og halga lív sítt til familjuna, so tey verða ein góð fyrimynd um trúskap fyri børnini. (Matteus 19:5-6)

16. Bjarga familjusamanhaldinum í **Kina**, miskunnsami Faðir, har metlág giftarmál eru, og øking í hjúnaskilnaði er, og tey eru seinni til at fáa børn, har stórt arbeiðstrýst er og ótrúskapur. Ger at tey venda sær til Tín at fáa grøðing. (1. Korintbræv 13:7)
17. Ver Tú ein troyst hjá børnum í **Danmark,** Harri, hvørs hjørtu eru særd orsakað av ógvusligum stríði millum foreldrini. Drag tey inn í Tínar kærleiksfullu, sterku armar. (Sálmur 50:15)
18. Harri, lat kvinnur í **Dominikalýðveldinum** taka ábyrgd av at uppala síni børn í áminning Harrans, og geva teimum ta umsorgan og nærleikan, sum tey hava serligan tørv á. (Efesusbrævið 4:2)
19. Hjálp unga fólkinum í **Eswatini** at hava eitt stavnhald og liva í reinleika, Faðir. Lat skúlar og ungdómsleiðarar geva teimum vón, og umbroyt Tú tey. (1. Timoteusarbræv 4:12)
20. Sum fólk í **Finnlandi** gerast eldri, lat tey kunna eldast við virðing. Gud, gev familjum og teimum, sum taka sær av teimum gomlu, styrki frá Tær. (Esaias 46:4)
21. Lívga børn tíni í **Fraklandi**, Harri, so tey fáa eitt inniligt samfelag við Teg! Nærum tveir triðingar av fólkinum har kalla seg sjálv kristin, men tey lesa ikki Bíbliuna og ganga heldur ikki í kirkju ella á møti. (Matteus 28:19-20)
22. Gud, sum talið av eldri fólki í **Japan,** sum eru avbyrgd, økist skjótt, lat kirkjur og samkomur náa tey við evangeliinum um ævigt lív og einum endamáli í Kristusi. (Jóhannes 4:13-14)
23. Faðir, kvinnur í **Portugal** kenna seg einsamar; lær okkum at boða evangeliið uttan at óttast, lurta uttan at døma og fáa sambond í lag, sum grøða, heldur enn særa. (Galatiabrævið 6:2)
24. Nú fíggjarliga støðan í **Rumenia** er torfør í ár, biðja vit, Gud, at Tú gevur kvinnunum vísdóm, hvussu tær skulu umsita tað, sum tær hava. (Orðtøkini 2:6)
25. Lat kvinnur í **Suður Afrika,** sum líða í tærandi hjúnalagi ella parlagi við misnýtslu og harðskapi, lat tær finna virði sítt í Tær, Harri. Grøð tær og set tær í frælsi. (Sálmur 46:2 – ensk: 46:1)
26. Heilagi Gud, sum hjúnaskilnaður framhaldandi økist í **Albania**, biðja vit um trúskap í hjúnaløgum, og at pør mugu umgangast hvørt annað sømiliga og við virðing. (Hebrearabrævið 13:4)
27. Veit kvinnum í **Bonaire** vísdóm, Harri, at seta sunn og gudilig mørk í parlagnum, og at sýta fyri at verða útnyttaðar. (Orðtøkini 4:23)
28. Faðir, gev kristnum familjum í **Danmark** styrki til at seta Teg fremst, og lata Orð Títt verða teirra vegleiðari í øllum lívsins viðurskiftum. (Filippibrævið 3:20)
29. Gud, styrk familjur í **Eswatini** við kærleika, gudsótta og einleika, og ger foreldur før fyri at ala børn síni upp í trúgv og friði. (1.Korintbræv 13:4-7)
30. Grøð familjur í **Fraklandi,** Harri, har ein triðingur av børnunum ikki longur býr hjá báðum sínum rættiligu foreldrum. Ístaðin eru heim við einligum foreldrum ella samansjóðaðum blandaðum familjum. (Efesusbrævið 4:31-32)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**

**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!”**

***Hebrearabrævið 4:16***

## At grípa vónina - Juni 2026

### Familjan: eitt náðinnar stað, eftir Susie Peck, altjóða leiðara

**”Men hvørt menniskja veri skjótt at hoyra, seint at tala, seint til vreiði!”** ***Jákupsbræv 1:19b***

Familjan er okkara fyrsta heim; staðið, har lívið byrjar, og har ein lærir, hvat kærleiki er. Fyrimyndarliga er tað ein frístaður, tá ið stormur herjar, og ein skúli, har vit verða lærd at vera tolin, at fyrigeva og koma at kenna, hvat gleði er. Heima verða vit myndað av mildum orðum og stundum torførum áminningum, men tó altíð umgyrd av bondum, sum minna okkum á, at har hoyra vit til. Familjan er ikki fullkomin, men hon er dýrabar – formað av Gudi bæði sum ein trygg havn og eitt livandi flokshøli fylt av náði.

Samskifti er ein av størstu gávunum, sum Gud hevur givið okkum. Tað gevur okkum loyvi at luta okkara hjartans hugsanir við onnur, siga frá okkara tørvum og knýta sambond. Tó er tað eisini eitt av størstu avbjóðingunum, sum vit møta. Eitt orð sagt í gáloysni kann særa djúpt, meðan eitt orð sagt í kærleika kann lekja og lívga.

Innanhýsis í familjum læra vit, hvussu vit eiga at bera okkum at. Heimið er har, ið forðingar mangan hvørva, og inniligur trúnaður gevur okkum frælsi at tosa frítt. Men hetta frælsið kann eisini føra til misskiljingar. Vit ganga út frá, at okkara kæru vita, hvat vit meina ella vænta, at tey lesa hugsanir okkara. Tá ið tey ikki gera tað, gerast vit ørkymlað, og viðurskiftini gerast spent.

Skriftin minnir okkum á kraftina í orðunum: ”Mild orð eru sum rennandi hunangur, sálini søt og likaminum heilsubót” (Orðtøkini 16:24). Innanhýsis kunnu orð annaðhvørt styrkja sambond ella skapa frástøðu . Ein einføld umbøn, um hon er ógreið, kann birta óneyðugt stríð. Ein særd kensla, kann veksa til firtni, um ikki verður tosað um tað. Tøgnin, tá ið hon verður nýtt sum revsing ella enntá sum vápn, kann gerast ein múrur, sum boðar frá avvísing í staðin fyri kærleika.

Sunt samskifti innanhýsis hvílir á trimum stólpum: **greidleika, gjøgnumskygni og mildleika.** Greidleiki tryggjar, at okkara orð verða skild. Gjøgnumskygni loyvir okkum at siga ærliga frá, tá ið vit eru særd ella skuffað. Mildleiki minnir okkum á, at tann inniligi trúnaðurin kann ikki nýtast sum ein umbering fyri at vera óhøviskur. Sjálvt í tættastu sambondum vísa einføld orð sum, ”kanst tú gera so væl”, ”takk fyri” og ”orsaka meg”, tekin um kærleika og virðing. Og latið okkum ikki gloyma nøkur av teimum orðunum, sum eru torførast at siga: ”Fyrigev mær.”

At lurta er eins týdningarmikið og at tosa. ***Orðtøkini 18:13*** ávara: **”Táið ein svarar, áðrenn hann hoyrir, verður tað roknað honum til dárskap og skomm.”** Og ***Jákupsbræv 1:19 b*** lærir: **”Men hvørt menniskja veri skjótt at hoyra, seint at tala, seint til vreiði.”** At lurta krevur tol, men tað letur upp dyrnar fyri, at vit kunnu skilja. Familja okkara kann tá síggja, at vit virða teirra hugsanir og kenslur.

Sjálvandi eru løtur, tá ið kenslur okkara fara við okkum, og okkum tørvar tíð, áðrenn vit aftur kunnu tosa róliga. Í slíkum løtum er tað klókt at siga: ”Eg havi brúk fyri eini løtu fyri meg sjálvan, men vit kunnu tosa saman seinni.” Henda einfalda orðingin boðar frá, at vit vilja vera bæði ærlig og ynskja, at ein loysn verður funnin. Hon forðar fyri, at tøgnin gerst eitt vápn, og í staðin gerst steðgurin ein háttur at fáa frið í lag.

Familjan er gáva Guds. Tað er tað plássið, har vit læra at fyrigeva, hava tol og elska. Tað er har, vit læra at tala sannleika í kærleika og lurta við opnum hjørtum. Gott samskifti vil ikki siga, at vit aldri gerast ósamd, men tað ber í sær, at vit taka okkum av ósemjum við virðing og mildleika.

Sum vit biðja fyri familjum kring allan heim, latið okkum minnast, at orð hava týdning. Tey kunnu byggja upp ella bróta niður. Tey kunnu lekja ella skaða. Má Harrin geva okkum náði og vísdóm til at finna tey blíðu orðini við mildleika, lívgan og sannleika í kærleika.

Takk fyri, at tit nýta orð tykkara at bera familjur kring allan heim fram fyri trónu Guds og biðja um varðveitslu, frelsu og endurnýggjan.

Í Hansara undurfulla kærleika,

***Susie Peck***

**Eeva Vähäsarja: "Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn"**

***KVINNUR VIÐ VÓN***

***twrwomenofhope.org***

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

***<u>Fíggjarstuðul:</u>***

***EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145***

***til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –***

***Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –***

***TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — <u>twre@twr.org</u>***